Ráðstevna í Norðurlandahúsinum

Umhvørvisleiðsla og grøn marknaðarføring

13. mai kl. 10:00-16:00

Skrá

10:00 **Skráseting og kaffi**

10:30 **Vælkomin**
Elin Lindenskov, forkvinna í Heilsu- og umhvørvisnevndini, Tórshavnar kommuna.

10:40 **Rákið í dag**
Margretha Nónklett, fólkalívsfrøðingur.

Ein ferð gjøgnum føroyska gerandisdagin, gjøgnum dreymar og tørv, og eitt djarvt boð upp á okkara nútíð og ábendingar um nærmastu framtíð.

Í fyrilestrinum hjá Margrethu Nónklett, fólkalívsfrøðingi, verður nomið við týðandi evni í gerandislívinum sum lívsstíl, brúkaramentan og umhvørvistilvitan.

Fyrilesturin gevur íblástur og innlit í okkara brúkaramentan og fólk fara helst at kenna seg aftur í ferðini gjøgnum føroyska gerandisdagin!

11:05 **Umhvørvisleiðsla sum partur av virkseminum hjá IKEA**
Jonas Engberg, stjóri í deildini fyri burðardygt virksemi, IKEA.

Greitt verður frá umhvørvisstrategiini, og hvussu vit støðugt arbeiða við at seta hesa í verk í gjøgnum okkara dagliga arbeiði.

Somuleiðis verður greitt frá samanhanginum millum umhvørvistiltøkini hjá IKEA og tann fíggjarliga partin av okkara virksemi.

11:50 **Ein grøn bilafyritøka**
Sámal av Reyni, søluleiðari, Reyni Service.

Hvat er ISO14001? Hví er Reyni Service farið í holt við ISO 14001? Hvat skal til fyri at verða góðkendur? Hvussu langt eru vit komin? Hvat ætla vit at náa? Hvat sigur botnlinjan?

12:10 **Døgurðasteðgur**

13:10 **Feskastu tilboðini til vinnuna**
Bárður Michelsen, leiðari, Kommunala Brennistøðin.
Á Kommunalu Brennistøðini verður burturkast frá vinnuni viðgjørt sambært viðurkendari raðfesting, eins og "CO2 roknskapur" er partur av grundarlagnum undir viðgerðarskipanunum og teimum tilboðum, sum vinnan í Tórshavnar kommunu kann gera nýtslu av í sambandi við burturkast.

13:25 **Vistfrøði, umhvørvi og ábyrgdarfull søla í fokus**
Bo Møller Hansen, marknaðarleiðari, Føroya Keypsamtøka.

Vit raðfesta umhvørvistilvit og vistfrøði, tí vit trúgva á, at tað er rætt, nú og í framtíðini!

13:45 **Svanamerkið prógvar sítt virði í Føroyum**
Hansina Dahl, marknaðarleiðari, Føroyaprent.

Hví hava vit valt Norðurlendsku Svanamerkingina? Hvussu verður ein fyritøka svanagóðkend? Grøn marknaðarføring og botnlinjan.

14:05 **Steðgur**

14:25 **Burðardygg framleiðsla - ein fortreyt fyri virkseminum**
Regin Jacobsen, stjóri, Bakkafrost.

Burðardygg framleiðsla er fortreytin fyri virkseminum hjá alifyritøkuni Bakkafrost. Bakkafrost hevur drúgvar royndir innan burðardygga framleiðslu, og arbeiðir áhaldandi við menning á umhvørvisøkinum. Hetta soleiðis at vit varðveita og tryggja eitt sunt og reint umhvørvi til gagns og frama fyri fiskatrivnaðin og virksemi felagsins.

Bakkafrost fer í framløguni at greiða frá hesum arbeiði og teimum ágóðum, ið standast av hesum.

14:50 **Burðardygg framleiðsla í heimsklassa**
Klaus E. Christensen, umhvørvisráðgevi, Grundfos A/S.

Grundfos A/S hevur í fleiri ár arbeitt skipað við umhvørvisleiðslu, eitt nú við 14001 certificering og sjálvbodnari EMAS skráseting. Hesi seinastu árini hevur Grundfos styrkt sín umhvørvisprofil við fleiri av vørunum, sum eru komnar á markaðin. Hetta hevur viðført økt fokus á burðardygd í framleiðsluni. Tær royndir, sum eru komnar burturúr, verða lýstar í framløguni.

15.35 **Handan av umhvørvisviðurkenning**

15:45 **Samanumtøka**

16:00 **Ráðstevnan endar**

Orðstýrari á ráðstevnuni er Óluvá Zachariassen, journalistur.